

# Vána kundar stemplaðir

Gongdin rundan um tjóðartøkuna av teimum báðum størstu bankunum í Íslandi, Glitnir og Landsbanki, eigur nú at fáa tað at renna kalt niður eftir rygginum á stórspekulantum, skrivar Børsen.Sambært keldum í Íslandi, sum kenna til ætlaðu tjóðartøkuna hjá Tjóðbankanum, verður í løtuni arbeitt við at kortleggja, hvørjir kundar man ynskir at varðveita í einum ella tveimum framhaldandi bankum. Men enn týdningarmiklari verður støða samstundis tikin til, hvørjir kundan man avgjørt einki vil hava við at gera. Ein kelda, sum kennir til tilgongdina, sigur við Børsen, at ein møguleiki, sum í álvara verður viðgjørdur, er at allir íslendingar verða koyrdir í ein »grønan« banka, meðan restin verður koyrd í ein reyðan banka, sum síðani skal avvikla hesar kundar, antin við at selja til áhugaðar keyparar ella koyra teir á heysin.

# Innsavning til AIDS-rakt børn

**Nú leygarkvøldið, 11. oktobur, verður skipað fyri einum stórum tiltaki í Oasuni í Hoyvík. Endamálið er at savna inn pening, sum fer til eitt heim fyri børn, ið annaðhvørt beinleiðis eru rakt ella hava mist onkran av AIDS. Tað er felagsskapurin »Samaritan's Purse«, ið stendur fyri barnaheiminum, »Jaja's Home«**

STUÐULSTILTAK

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Ilda Lómstein og Alice Mortensen eru umboð fyri felagsskapin Samaritan's Purse í Føroyum standa fyri tiltakinum. Felagsskapurin hevur virkað síðan einaferð í 1970 og hevur verið víða um og veitt hjálpararbeiði. Arbeiðið, ið verður sett fokus á á hesum sinni, er eitt barnaheim í Uganda. Á heiminum eru børn, ið eru HIV, ella AIDS smittað ella hava foreldur, sum eru. Børnini fáa heilsugóðan mat, undirvísing, kristindómsundirvísing og heilsurøkt. Á heiminum skuldu upprunaliga vera um 80 børn, men talið er nú vaksið upp á 200. Nógvu børnini merkja, at útreiðslurnar eru vaksnar samsvarandi, so stórur tørvur er á fíggjarligum stuðli.

Leygarkvøldið klokkan 20, verður eitt stórt tiltak í Oasuni. Á skránni verður kunning um Samaritan's Purse og Jaja's Home. Logos bókahandil hevur bókasølu, har ein partur fer til hjálparabeiðið. Dansiframførslur og sangframførslur, við eittnú Heina Lützen eru eisini á skránni.

Tað er samkoman Lívdin, ið heldur til í Hoyvík, ið skipar fyri tiltakinum. Hóast Lívdin vanliga heldur til í Hoyvíkar skúla og í húsunum á Brekku, verður tiltakið sjálvt í Oasuni, eisini í Hoyvík.

Eitt av endamálunum hjá Ildu Lómstein og Alice Mortensen, ið umboða altjóða felagsskapin, er at náa øll tey, ið ynskja at hjálpa sínum felags heimsborgarum. Hetta merkir, at ikki einans tey, ið eru knýtt at eini samkomu ella eru kristin, eru vælkomin.



Tað er tann menniskjaliga síðan, ið skal verða rokkin.0

## Grønlandstíðindi

Kári við Stein

Kári við Stein:

# Føroysk luttøka í fiskivinnuframsýning

**Okkara maður í Grønlandi greiður frá teimum seinastu fiskivinnutíðindunum**

### 8. september

Í dag er lot av norði. Polar Qrasiut kom inn at landa í morgun. Teir hava fulla last, gott og væl 430 tons. Tað eru 13 dagar síðani, teir byrjaðu fiskarí. Teir hava verið heilt uppi á 69 stigum og roynt henda túrin. Lómur er komin inn til Illulisat at landa. Teir hava um 122 tons inni. Natarnaq er inni í Aasiaat og landar í dag. Har var alt fult hjá teimun eisini.

### 9. september

Í dag kom Sisimiut inn at landa og at skifta fólk. Teir hava gott 400 tons av svartkalva inni. Inusuk er í Nuuk og landar.

### 10. september

Akamalik kom inn at landa í morgun. Har var alt fult hjá teimum. Prísurin hjá teimun er fyri uppgangandi, um 17 kr kilo.

### 11. september

Markus kom inn at landa seinnapartin. Har var alt fult hjá teimum. Teir hava eisini verið norðuri í Aasiaat og millumlanda. Við tí hava teir tilsamans knapt 900 tons henda túrin. Teir tøma ikki skipið, tí teir skulla vera í Nuuk og landa tann 18 september. Tasermiut er inni í Nuuk og landar í dag eisini. Tað sama eru Polar Aassik og Polar Natarnaq .

### 14. september - Fiskarímessan

Eg var á fiskarímessuni, sum var her í býnum 12-14. september. Har var so at siga onki nýtt, sum var framkomið. Men eg legði merki til, at tað er hørð kapping innan egningartraktir. Eg sá DVD fløgur av teimun 3 modellunum, sum vóru her á messuni. Tað var ein donsk, ein íslendsk og so Oilwind. Har var Oilwind tann stinnasta, har var onki at taka feil av. Jákup Joensen var her fyri Oilwind. Hann segði, at hann hevði gjørt nakrar handlar hesar daganar. Vónin, har Petur Jacob Jacobsen, ættaður av Skipanesi, er leiðari, lat væl at. Hjá teimum hevði tað gingið heilt væl við søluni. Teir hava fingið nógvar ordrar. Fyri AWI-boats var Adalstein Antoniusen á messuni. Hann segði, at teir skulla geva fleiri tilboð. So tað er at vóna, at okkurt ítøkiligt kemur burtur úr hjá teimum.

### 15. september

Heystið er við at koma her hjá okkum. Vit hava haft hvítt oman í hálvan hagan. Longu 22. august var hvítt í bakka suðuri í Iterleqfjørðinum. Eg tosaði við nakrar norðmenn, sum vóru komnir higar at fiska síl. Teir søgdu, at tað var ógvuliga kalt at vakna í telti tann morgunin. Qaqqatsiaq kom inn í morgun at millumlanda. Har var alt fult hjá teimun. Teir skulla inn til Nuuk tann 21. at tøma skipið. Polar Amaroq er inni í Nuuk at landa og skifta fólk.

### 20. september

Tað er hvítt í bakka í morgun. Lómur kom inn til Illulisat at landa í morgun, og tad sama kom Annunguaq II. Teir hava um 110 tons inni. Kanadiarin Qujukuaq kom inn at landa svartkalva. Teir hava knapt 150 tons henda túrin .

### 21. september

Tað er frætt er frá kanadiaranum Atlantic Enterprice. Teir royna ímillum 62 og 63 stig eftir svartkalva. Veðrið hevur ikki verið til vildar hjá teimum. Teir mangla 150 tons. Síðan skifta teir til rækjufiskarí. Qaqqatsiaq er veg til Nuuk at landa. Skipið er fult hjá teimum. Við tí, teir løgdu upp her, er lastin 12 mill. verd. Hetta tørnið hava teir fiskað fyri 29 mill. kr. í 45 dagar. Tað er óført fiskarí.

### 22. september

Natarnaq kom inn at landa í morgun. Teir hava gott 420 tons inni. Í Manitsoq kom Manu inn at landa svartkalva. Teir hava gott 280 tons inni. Manu er fyrrverandi Koralen úr Álesund. Hann lastar um 600 tons av frystum. Teir hava roynt út ímóti markinum. Har eru fleiri bátar nú og royna. Millum hesar er Skálaberg, sum hevur verið har eina góða viku. Sum sagt er Qaqqatsiaq í Nuuk og landar.

### 23. september

Natarnaq loysti longu í morgun nýggjan túr, og tá ið teir vóru leysir, kom fyrrverandi Tassilak, nú Agatian Gale, úr Kanada inn at bunkra og leggja 100 tons av svartkalva upp.

### 24. september

Í dag kom Polar Qrasiut inn at landa. Teir hava knappa fulla last inni. Akamalik landar í Aasiat gott og væl 400 tons. Teir royna har norðuri við Disko, har bátarnir hava funnið eina nýggja leið. Polar Nattoralik er í Nuuk og landar í dag.

### 25. september

Steffen C er inni í Manitsoq og landar fulla last.

### 26. september

Sonja Kiil II kom inn at landa jákupskeljar. Teir hava 20 tons inni.